


Jens Dam:

# Skipari og seglmakari

**Jens Dam er eitt ísýniligt navn í gamla kirkjugarði. Hann hevur ein stein við klárari innskrift. Tað er tó ikki so nógv, sum vit vita um Jens, uttan at hann var skipari og seglmakari. Men ein yrking bjargar søguni**




Óli Jacobsen
olij@sosialurin.fo


Jens var av Damættini, sum er stór í Havn og um landið. Pápin var Johan Henrich Dam f. umleið 1805 á Oyrareingjum. Hann var uppsitari í Hoyvík og doyði í 1884. Mamman var Johanne Frederikke f. Reinert í Kaldbak í 1815. Hon doyði í 1868 í Kaldbak. Tey bæði giftust í 1838 í Havn. Jens varð føddur í 1844.

Jens giftist í 1873 við Onnu Katrinu Olevinu Jacobsen, f. 1852 í Havn. Eitt av teirra børnum er Andrea Nicolina, f. 1878, sum giftist við Magnus á Kamarinum. Ein sonur teirra var Jens Dam Jacobsen. Tá ið abbin var deyður, skrivaði Jens soljóðandi yrking um abban í Dimmalætting:



*Johan Dam*



*Jen Dam Jacobsen yrkti um pápa sín*

**Til áminningar um Jens Andreas Christian Splid Dam, fyrrverandi skipara, ið andaðist 13. oktober 1932**

Dapur skýggj seg legði
yvir tey,
ið innandura sótu,
tøgn bert tøgn har ráddi inni,
neyðar mann'børn
stillisliga grótu,
deyðans eingil komin var
heim at taka troyttan mann -
fagurt fekk hann aftursvar
tøkk, o Gud, tú til mín fann.

Minni nógv vit eiga eftir
tær, ið nú er farin frá.
Vetrar- eins og
summarkvøld, tá á
beinkinum tú lá.
Mangar vórðu ferðir strangar
yvir havið heystardag,
har tit hittu fjaldar drangar,
bylgjan fyri bógvi vað.

Mangan ringan undir landi,
meðan suðið anda dró,
hav og himmal alt í einum
brotið skipið sundursló.

Allir mans í bátar niður.
Deyðin er so tætt her hjá,
neyðarróp øll, stormur tigur.
Nær, so nær kenst stundin tá.

Álitið tú hevur altíð, tá tú
sigldi havi á,
á tann Gud, ið øllum ræður,
hann ið tíðum til tín sá.
Ikki bert tá lív umráddi
týddi tú til hansar' orð.
Bønin altíð til hann náddi,
áðrenn verkið fór í sor.

Tá ið vandi var í hondum,
neyðin tóktist størst,
funnu mong til tína gátt, hjálp
tú gav – og hon var føst.
Eingin aftur fór avstað
uttan væl av ráðum fróur.
Soleiðis gekkst – og
mangan dag
breyt tú nýggjar stjørnuslóðir.

Reystir synir føddir eru her á
hesum fjallalandi, mangir
hvíla undir torvu, spáka
fram við hvítum sandi.
Teirra millum manst tú vera,
arbeiðsstríðið fell tær lætt:
Andróð'rstøk teg mundu
herða, kósin, hon var altíð rætt.

Aldri lætst tú blinda røðu spilla
tí, tú royndi móti,
opin panna var títt merki,
viljin sterkur eins og grótið.
Ein so hugsar best í eystur,
annar ynski ber í vestur,
slíkt var fjart í tínum huga,
tí tú lætst Várharra ráða.

Støðugt stríð er lívið her,
alt frá byrjan og til enda.
Men tín leið var klár og greið,
har á lív' tú kundi lenda.
Nú í frið tú hvílir kvirt,
navnið títt vit aldri gloyma.
royndt eg havi her at yrkt,
minnið eitt vit eftir goyma.

Friður yvir navni títt
sov nú abbi, har er frítt,
har tín sál sín anda dregur,
meðan summar burtur svevur

Henda vakra yrking gevur ábending um ein megnarmann, sum hevur havt síni avrik á sjónum. Hann var sum nógvir havnarmenn eisini traðarmaður og eisini lagt inn trøðna, har abbasonurin Jens nú býr.

**Sonurin tók ein trolara**

Jens og Nicolina áttu fýra børn umframt Nicolinu. Jens búði á Tvøroyri og var blaðstjóri á Føroyatíðindi. Anna giftist við fyrsta barberinum í Føroyum, dananum Anthony Nielsen, sum búsettist í Konradsbrekku. Jóhanna var ógift. Ein sonur var Johan Dam.



*JENS A. C. S. DAM*
*F. Í HOYVÍK*
*FYRRVERANDI SKIPARI*
*OG SEGLMAKARI*
*25.8.1844*
*D. 13.10.1932*

*A. C. OLEVINE DAM*
*F. JACOBSEN*

*F. 26.6.1852*
*D. 10.5.1934*

*GUDS FRIÐUR VIÐ*
*TYKKUM*



*Jens og Olevina Dam*

Tá ið hann og konan Hansina høvdu silvurbrúðleyp í 1938 stóð í Dimmalætting ein grein um tey bæði. Vit fara at endurgeva brot úr hesi greinini, sum gevur ábendingar um, at Johan eisini hevur verið ein úrmælingur:

Johan M. Dam fekk á ungum árum aldri pláss á fútakantórinum, har hann hevur virkað mestan partin av ævi síni. Áðrenn hann kom hagar, hevði hann í fleiri ár tikið lut í útróðri og vandist upp av so góðum og gitnum sjómonnum sum brøðrunum Christian og Johan Christiansen (í Dali) og faðiri sínum Jens Dam. Meðan hann var á fútakantórinum tók hann navigatiónina, og ein vetur virkaði hann sum navigatiónslærari. Hann hevur havt mong álitisstørv, t.d. verið formaður í Tórshavnar valstýri, felagsskrivari í Føroya Skipara og Navigatørfelag, limur av líkningarnevndini, skattmeistari fyri hospitalið og so framvegis. Frá 1912-1915 var hann limur av løgtinginum, valdur av sambandsflokkinum fyri Suðurstreymoy.

Í 1924, meðan hann var sýslumaður í Vágum, gjørdi hann eitt bragd, sum flest øll vilja minnast.

Hann hevði fingið boð um, at tríggir trolarar lógu inni undir Sørvágsbjørgum. Hann var kvikur at manna bát og legði at tí eina trolaranum, men mannskapið við skiparanum á odda forðaði honum at koma upp á dekkið. Vápnaleysur sum hann var, eins og teir ið við honum vóru, kundi her einki gerast, men tó eydnaðist honum at fáa nummarið á øllum skipunum. Dagin eftir frættist, at tveir av hesum somu trolarum lógu á Miðvági.

Harra Dam var skjótur avstað og legði at skipunum við tveimum bátum. Sjálvur kom hann sær upp á trolaradekkið í evstu stund, men hin bátsskipanin var skumpað í land av tí eina trolaraskipanum, sum skundisliga slapp sær avstað. Hinum trolaranum tók hann ræði á og førdi hann sjálvur til Havnar, har skiparin fekk eina bót uppá kr. 1.500 til statskassan og kr. 100 til amtsfátækrakassan, umframt at hann misti veiðuna, allan reiðskap og mátti gjalda sakarkostnað.

At tað var eitt heppið bragd Johan M. Dam her avrikaði, vóru øll tey føroysku bløðini á einum máli um, og vit føroyingar hava alla grund til at minnast hesa hending, ið var orsøk til, at meira ferð og betri lag kom á sjóverjuna undir Føroyum.

Hansina Dam er kend sum ein sera røsk og dugnalig húsmóður, ið sjáldsama væl hevur dugað at røkt sítt heim og síni børn. Hon hevur verið manni sínum ein hollur stuðul.

**Næstu ferð:**
Komandi partur verður um Jens í Dali, kendur skipari, reiðari og navigatiónsskúlalærari